# Djórapínsla

Av og á kemur fyri, at djór ikki verða viðfarin heilt so væl, sum flestu okkara kundu hugsað sær. Oftast er í slíkum førum talan um vanrøkt, har ánarin av djórum ikki tekur atlit til tørvin hjá hesum, men við hvørt er talan eisini um meira beinleiðis djórapínslu.

Og øðrvísi enn hetta fær talan neyvan verið um, tá hugt verður at myndini omanfyri. Ein flokkur í Hoyvíkar skúla kom fram á hendan hundin, sum var skolaður upp á land við dráttin í Gomlu hoyvíkini.

Hvør tað er, sum stendur aftan fyri gerðina, vita vit ikki, men andstyggilig er hon í øllum førum. Við labbunum fastbundnar upp móti kjaftinum er hundurin tveittur á blámann, og tá so er, hevur neyðardýrið ongan møguleika at svimja, men hevur trýst seg sjálvan alt meira niður, meira hann hevur spjálkað við afturbeinunum.

Myndamaður okkara hevur tikið tikið hesa myndina av hundinum, og sum tað framgongur, so hevur deyðin verið alt annað enn tespiligur.

-jm



*Við framlabbunum bundnum upp undir kjaftin hevur neyðardýrið ongan møguleika havt at lívbjargað sær*

*Mynd: Jens Kristian Vang*


**Móttøka í Hoyvíkar Skúla**

Við skúlaárslok 2003 verður leiðaraskifti í Hoyvíkar Skúla

Petur Dahl, skúlastjóri leggur frá sær, og Birgit Arge tekur við sum nýggjur skúlastjóri.

Samstundis tekur Ólavur Skipagøta við sum varaskúlastjóri.

Í hesum sambandi er almenn móttøka í skúlanum fríggjadagin 20. juni klokkan 16 - 18

**Hoyvíkar Skúli**






ADVOKATVIRKIÐ

**Skúlabarnakoyringin í Tvøroyrar kommunu**

Vegna Tvøroyrar kommunu verður skúlabarnakoyringin í kommununi við hesum boðin út.

**Arbeiðið umfatar:**
34 túrar um vikuna millum skúlan á Tvøroyri og skúlan í Trongisvági og 16 rund túrar um vikuna í kommununi

**Kapacitetskrøv:**
40 børn dagliga.

**Arbeiðstíð:**
Frá uml. 7.30 til umleið 16.30.

**Sáttmálaskeið:**
Frá medio august 2003 til 30. juni 2004.

**Freist:**
Tilboð skulu vera inni í seinasta lagi 30. juni 2003.

**Nærri upplýsingar:**
Møguligir fyrispurningar og nærri upplýsingar um málið fáast við at venda sær til Tvøroyrar kommunu

**Fyrivarni:**
Kommunan skilar sær rætt til at velja millum tilboðini ella at vraka tey øll.

**Tilboð skulu sendast skrivliga til:**

**ADVOKATVIRKIÐ**
Páll Nielsen Eyðhild Skaalum
Sigmund Poulsen Hans Trygvi Teirin
Skansavegur 1, Postsmoga 85, 110 Tórshavn
Telefon 319171 - Telefax 315874
E-mail: advokatvirkid@advokatvirkid.fo




# Setrið skerdi talufrælsið

*Meiningin hjá Jógvani Mørkøre, adjunkti, og øðrum starvsfólki á Fróðskaparsetrinum skal eisini hoyrast uttan fyri gluggarnar á Setrinum, sigur aðalstjórin í Mentamálaráðnum, sum er hægsti myndugleiki á økinum*



**Fróðskaparsetrið hevði ongan rætt at geva samfelagsfrøðinginum Jógvani Mørkøre ávaring, tí hann úttalaði seg kritiskt um nógv umrøddu Menas-frágreiðingina, sum Fróðskaparsetrið legði navn til. Tað er niðurstøðan hjá Mentamálaráðnum, sum finst harðliga at leiðsluni í Fróðskaparsetrinum fyri at hava borið seg skeivt at**

GRANSKING
*Ingi Rasmussen*

Framsøgufrælsið hjá Jógvani Mørkøre varð skert í óneyðugan mun. Og tí verður ávaringin, hann fekk frá leiðsluni á Setrinum hin 22. februar 2002, ógildað.

Tað er í stuttum niðurstøðan, sum Mentamálaráðið er komið til eftir at hava viðgjørt eina kæru frá Jógvani Mørkøre, adjunkti á Søgu- og samfelagsdeildini.

Alt byrjaði við, at Jógvan Mørkøre var rættiliga opinskáraður í Sosialinum tann 15. februar 2002. Eftir at partar av sonevndu Menas-frágreiðingini, sum skuldi viðgera avleiðingar av einari oljuvinnu í Føroyum, vóru komnir fram, gjørdi Jógvan Mørkøre púra greitt, at Setrið átti ongan lut í kanningini.

Málið var reist sum fyrispurningur í løgtinginum, og tí tók adjunkturin blaðið frá munninum. Granskingin varð stýrd av oljufelagnum BP og Menas, og Fróðskaparsetrið var bara undirveitari, segði hann og fanst bersøgin at tilgongdini til frágreiðingina, ið fekk nógva umrøðu – ikki bara fyri tað góða.

## Skert talufrælsi

Fyri sína hjartans meining fekk Jógvan Mørkøre eina ávaring frá ovastu leiðsluni í Fróðskaparsetrinum, sum eftir avgerð á setursráðsfundi eisini gav honum munnkurv.

Sagt varð í ávaringini, at Jógvan Mørkøre skuldi lata vera við at úttala seg ella at skriva nakað í sambandi við Menas-frágreiðingina, sum kundi seta Fróðskaparsetrið í ringt ljós og skaða umdømi innan- og uttanlands. Ávaringin gav sostatt Jógvani Mørkøre eina avmarking, sum minnir um tagnarskyldu.

Hetta var ávarsligt, tí tað er ein grundlógartryggjaður rættur hjá starvsfólkum at kunna tala og skriva frítt. Kanska er tað serliga umráðandi í einum universiteti, ið byggir á trúvirði, at vísindalig starvsfólk siga tað, sum tey meina. Bert í undantaksføri kann tagnarskylda áleggjast, um tað er neyðugt fyri at verja ávís almenn og privat áhugamál, stendur m.a. í fyrisitingarlógini.

## Kærdi og vann

Ávaringin gjørdi, at Jógvan Mørkøre fór í farloyvi frá sínum starvi á Søgu- og samfelagsdeildini »fyri at sleppa burturúr øllum rokinum«. Samstundis kærdi hann umvegis Magistarafelagið átaluna fyri Mentamálaráðið.

Sakførarin hjá Magistarafelagnum mótmælti, at setursráðið skerjir framsøgufrælsið hjá starvsfólki – og hetta hóast ongar fyriskrivaðar mannagongdir finnast um hesi viðurskifti á Fróðskaparsetri Føroya.

Málið gjørdist drúgt, og Mentamálaráðið kom til sína niðurstøðu 5. mai 2003. Sosialurin hevur fingið innlit í niðurstøðuna, sum Petur Petersen aðalstjóri hevur undirskrivað.

Staðfest verður, at »ávaringin skerjir framsøgufrælsið í óneyðugan mun«. Víst verður á, at umrøðan hjá Jógvani Mørkøre fer fram í fjølmiðlunum, eftir at onnur, sum hava havt við málið at gera, hava verið úti alment og umrøtt kanningina. Tað vil siga, at hóast frágreiðingin ikki enn er almenn, so eru partar av henni longu almannakunngjørdir, eins og samstarv og annað longu hevur verið lýst.

## Fleiri feilir

Mentamálaráðið leggur í sínari niðurstøðu dent á, at í hesum føri átti Setrið at hava undirskrivað eina avtalu, áðrenn arbeiðið varð sett í gongd, sum gav pørtunum greiðar reglur at arbeiða eftir, so tað slapst undan ivamálum um, nær og hvussu arbeiðið skal almannakunngerast.

Mentamálaráðið vil ikki gera metingar um, hvørt orðingarnar hjá Jógvani Mørkøre hava skatt Setrið, tí luttøkan hjá Fróðskaparsetrinum í vísindaligum arbeiði er ikki trúnaðarupplýsing, sum er fevnd av tagnarskyldu.

Umframt prinsipiella málið um skerda framsøgnarfrælsið hjá adjunktinum, vísir Mentamálaráðið á fleiri málsviðgerðarfeilir, sum leiðslan á Setrinum gjørdi, tá ávaringin fall. Eitt nú verður víst á, at Jógvan Mørkøre ikki sjálvur varð hoyrdur, og at avgerðin hjá setursráðnum kundi verið øðrvísi, um Jógvan Mørkøre fekk hetta høvi. Tí sambært skjølum í málinum, sum lýsa samskiftið millum hann og rektaran, hevði Jógvan Mørkøre eina greiða meining um og fatan av, hvat er farið fram.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Maluni Marnersdóttir, rektara Fróðskaparsetrinum, tí hon var uttanlands. Jógvan Mørkøre, sum aftur er adjunktur á Søgu- og samfelagsdeildini, vildi heldur ongar viðmerkingar gera í gjár.

Samanumtikið verður sagt frá:

- at starvsfólk á Fróðskaparsetri Føroya arbeiða undir somu treytum sum onnur alment sett starvsfólk
- at ongar ætlanir eru um at fyriskriva serligar reglur viðvíkjandi framsøgufrælsinum hjá starvsfólki á Fróðskaparsetri Føroya
- at framsøgufrælsi í hesum máli er skert í óneyðugan mun
- at ávaringin ikki verður mett at skula hava havt ávirkan á starvssetanina
- at munandi málsviðgerðafeilur hevur við sær, at avgerðin um at geva Jógvani Mørkøre ávaring verður at ógildað

*Kut úr niðurstøðu hjá Mentamálaráðnum, dagfest 5. mai 2003*